# Gott umdømi alt at siga

**Uttanríkisráðið hevur orðað uttanríkispolitikk Føroya, og eitt av aðalmálunum er at skapa okkum eitt gott umdømi, antin vit so skulu selja eitt fiskaflak úr Barentshavinum ella eitt hotellkamar á Viðareiði, sum tikið verður til**

Leo Poulsen

Nú er ein uttanríkispolitikkur orðaður, og hesin verður lagdur fyri Tingið í dag. Parturin um Føroyar sum siglandi tjóð er soleiðis orðaður:

Vit eru oyggjaland og siglandi tjóð. Havið hevur altíð verið okkara farleið til onnur lond; havið hevur knýtt okkum at øðrum londum, mentanum og marknaðum til mikið gagn fyri okkum. Vit hava fingið til lívsins uppihald, og væl og virðiliga tað burturúr havsins tilfeingi. Okkara vitan um havið, tess ávirkan á veður og vind og ikki minst okkara kunnleiki um livandi tilfeingi í havinum er ein styrki, ið vit frameftir eiga at byggja víðari á.

Vit eiga sjálvandi at gagnnýta tilfeingið á ein sjálvberandi hátt, og vit hava ment eina ta mest vælvirkandi umsitingarskipanina í heiminum, fiskidagaskipanina til hetta endamál. Vit taka virknan lut í fiskiveiðisamstarvi og eru í eini tilgongd at vinna okkum rættindi langt heimanífrá, eitt nú í bæði Suður- og Norðurstillahavi. Fiskivinnusamstarv á økisstigi kann eisini fáa týdning fyri Føroyar sum tilfeingisdepil.

Eisini her er umdømi okkara úteftir sera týdningarmikið. Lítil ivi er um, at tað loysir seg betur fyri okkum og okkara vinnulív, at vit hoyra til tann siðmenta og ábyrgdarfulla partin av heimssamfelagnum, ið samstarvar um skynsama røkt av fiskastovnunum.

### Knýta sambond

Tá ið vit, sum eru so evarska lítil í tí stóra høpinum, vilja samvinna við onnur og selja teimum eitt og hvørt, antin tað er eitt fiskaflak úr Barentshavinum ella eitt hotellkamar á Viðareiði, tá er ógvuliga umráðandi, at vit hava eitt gott umdømi sum land. Tað gevur eisini sjálvsálit, at vit sanniliga átaka okkum okkara part av ábyrgdini. Vit skulu í øllum lutum kunna vera errin av at vera partur av hesi tjóð.

Vit eiga serfrøði á altjóðastigi, serstakliga viðvíkjandi havinum. Okkara serfrøði eigur at fáa møguleikar at mennast uppaftur meira, bæði okkum sjálvum at gagni, men eisini til tess at Føroyar kunnu geva sítt íkast til granskingina og menningina av betri umsitingarskipanum úti um heim. Eisini her er opinleiki, víðskygni og framsókni vegurin fram. Føroyar hava havt eydnuna við sær í samráðingum við ES um føroyska luttøku í rammuætlan fyri gransking.

Norðurlendskt samstarv er ein týdningarmikil pallur hjá Føroyum at virka á. Har eru øll politisk øki til viðgerðar, og vit hava framvegis nógv at vinna við at luttaka í hesum samstarvi. Vit gera tað eitt nú við í 2010 at átaka okkum part av danska formansskapinum í Norðurlendska samstarvinum. Vit hava valt at seta sjóneykuna á havið, millum annað við at skipa fyri altjóða ráðstevnu um evnið í Føroyum seinni í ár.



**FEST Á BLAÐ**

*Uttanríkismálaráðið hevur nú orðað føroyskan uttanríkispolitik*

Vit vilja halda fram at menna møguleikar okkara í altjóða høpi við at knýta sambond, skapa bestu marknaðaratgongd og vinna okkum nýggj fiskirættindi. Luttøka Føroya í altjóða samfelagnum verður áhaldandi styrkt í samstarvi við onnur fyri at røkka málinum um vaksandi vinnumøguleikar og øktan búskaparvøkstur. Vit skulu gerast eitt land, sum dregur fólk og íløgur til sín.

leo@sosialurin.fo

# 23,5 milliónir til íbirting

**Sama dag sum Føroya Banki boðaði til tíðindafund um eitt nýtt íbirtingarfelag, sendi Eik Banki út tíðindaskriv um tað sama. Enntá hava bæði feløgini fingið sama navn**

Leo Poulsen

Tað er eftir áheitan frá Vinnumálaráðnum, at Føroya Banki og Eik Banki saman við øðrum nú hava stovnað hvør sítt íbirtingarfelag.

Endamál og leistur er hin sami hjá báðum bankunum, men meðan Føroya Banki er einsamallur um sítt felag, eru tað Eik Grunnurin, P/F Royndin, TF Holding og P/F SMS, ið standa aftan fyri hitt felagið – sum altso eisini hevur fingið navnið P/F Birting.

Tað er tó greitt, at Føroya Banki hevur skrásett hetta navnið, og tí er lítið sannlíkt, at felagið hjá teimum fýra fyritøkunum eisini kann eita Birting.

Feløgini eru ætlað at stuðla undir í uppstartingarfasuni hjá nýggjum íverksetarafyritøkum, har váðin er størstur. Sokallaðu Valley of Death-fasuni. Bæði íbirtingarfeløgini verða umsitin av nevndum við royndum vinnulívsmonnum, ið skulu meta um feløg og verkætlanir. Dentur verður lagdur á, at talan er um íverksetarafyritøkur við stórum vakstrarútliti.

Í nevndini hjá Birting (Føroya Banki) sita Líggjas í Bø, sum verður stjóri, Súni Schwartz Jacobsen og Bárður Nielsen. Í nevndini hjá hinum samtakinum sita Niels Mortensen, Jens Willumsen og Teitur Samuelsen.

### Tørvurin nøktaður

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at málið hjá Vinnumálaráðnum var at fáa váðafúsan kapital upp á einar 25 milliónir krónur til endamálið, og við 10 milliónum í Birting og 13,5 í hinum samtakinum er málið nærum rokkið.

Landsstýrismaðurin metir, at tørvur hevur verið á slíkum íbirtingarfeløgum, sum kunnu hjálpa nýggjum fyritøkum í gongd, og við teimum báðum feløgunum, ið nú eru stovnað, skuldi tan tørvurin verið nøktaður.

Bæði nýstovnaðu feløgini seta sjálvandi ávís krøv til feløg og verkætlanir, sum tey hjálpa í gongd. Eitt nú skal íverksetarin sjálvur seta eina munandi fíggjarliga upphædd í verkætlanina, eins og íbirtingarfeløgini vilja hava ávirkan á leiðsluna beinleiðis ella óbeinleiðis.

Eitt annað krav frá Føroya Banka er, at felagið er føroyskt skrásett, og av tí at váðin hjá einum íbirtingarfelag er nakað størri enn í einum vanligum íløgufelag, er kravið til væntaða avkastið eisini nakað størri.

Súni Schwartz Jacobsen segði á tíðindafundinum mánadagin, at teirra felag er skrásett og klárt at fara til verka, meðan felagið hjá teimum fýra fyritøkunum fer til verka innan stutta tíð.

leo@sosialurin.fo